# Fíggjarlógin fer at geva yvirskot

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur latið fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 úr hondum. – Fíggjarlógin fer at geva yvirskot, og pláss verða eisini fyri skattalættum, sigur landsstýrismaðurin, sum annars ikki vil tosa um tøl, áðrenn uppskotið verður lagt fram alment mánadagin**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Fíggjarlógin fyri næsta ár fer at geva yvirskot, og pláss verður eisini fyri skattalætta, sigur Karsten Hansen, sum fer at leggja fíggjarlógaruppskotið fram á tíðindafundi mánadagin*
*Savnsmynd*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt síðstu hond á uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár. Uppskotið er farið til prentingar og skal leggjast fram fram á tíðindafundi mánadagin.

Fíggjarlógin fyri 2003 er fyrsta fíggjarlóg hjá hesi samgonguni, sum sá dagsins ljós 6.juni í ár. Á búskaparliga økinum hava teir fýra flokkarnir sett sær fýra mál, sum eru feld niður í sjálvt samgonguskjalið:

- Búskaparliga skal munurin millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini vaksa positivt á hvørjum
- Landsstýrið miðar eftir at gjalda niður skuld skjótari enn ætlað
- Blokkstuðulin verður fastfrystur
- Skatturin skal lække

Karsten Hansen sigur, at hóast stór mál vóru niðurfeld í samgonguskjalið, so metir hann, at fíggjarlógin fyri 2003 fer at liva upp til samgonguskjalið. Fíggjarlógin fyri í ár er tann fyrsta, síðan ríkisveitingin úr Danmark varð skerd, og 623 milliónir krónur verður eisini upphæddin, sum kemur úr Danmark næsta ár.

- Málið er jú, at vit sum frálíður skulu fáa ein sjálvberandi búskap. Vit kenna fortreytirnar, og tí noyðast vit at laga fíggjarlógina eftir hesum, sigur Karsten Hansen. Hann slær tó fast, at yvirskot verður á fíggjarlógini fyri næsta ár.

### Verður pláss til íløgur

Karsten Hansen vil ikki siga, hvussu nógv verður eftir til íløgur á fíggjarlógini fyri næsta ár – hann vil bara siga, at rúmd verður at gera íløgur.Men tað er sumt, sum bendir á, at spurningurin um raðfesting av íløgum verður meira aktuellur nú enn fleiri av undanfarnu árum.

Tí landskassin hevur longu bundið seg til fleiri íløgur, sum lættliga kunnu køva allan annan íløgutørv hjá tí almenna.

Landskassin hevur bundið seg til at gjalda 102 milliónir krónur í avdráttum til nýggja Suðuroyarskipið næsta ár, og harumframt skulu íløgur gerast fyri 30-35 milliónir krónur í samferðsluhavnir í Suðuroynni. Harumframt skulu 30 milliónir gjaldast næsta ár til Norðoyatunnilin og 20 milliónir krónur til undirsjóvartunnilin um Vestmannasund. Í sínum langtíðarætlanum hevur landsstýrið budgetterað við, at Landsverkfrøðingurin skal nýta 41 milliónir krónur til íløgur í landsvegir í 2003, 35 milliónir krónur skulu nýtast til nýbyggingina á Landssjúkrahúsinum og aðrar 8 milliónir skulu nýtast til íløgur í tól til Landssjúkrahúsið. Bara hesi fáu tøl, sum byggja á lógarbundnar útreiðslur til íløgur og langtíðarætlanir sambært fíggjarlógini fyri 2002, geva tilsamans yvir 250 milliónir krónur.

Sosialurin hevur frá keldum fingið at vita, at samlaða íløguloftið á fíggjarlógini fyri 2003 fer at liggja um 250-260 milliónir krónur næsta ár. Karsten Hansen vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til hetta tal, men sigur kortini, at síðstu árini hevur loftið ligið báðu megin hetta tal, og at talið tískil ikki er heilt við síðuna av.

### Pláss til skattalætta

Nú arbeiðið at snikka saman eitt fíggjarlógaruppskot fyri 2003 er liðugt, er Karsten Hansen sum heild væl nøgdur við úrslitið. Hann hevur so mikið stórt álit á fíggjarlógaruppskotinum, at hann er sannførdur um, at tølini fara at halda tá saman um kemur.

- Vit hava gjørt eitt fíggjarlógaruppskot, har atlit eru tikin til samlaða búskapin og tað, sum er felt niður í samgonguskjalið, sigur Karsten Hansen. Hann leggur afturat, at pláss verður til íløgur, og eisini kann hann lova, at pláss verður til skattalætta á fíggjarlógini fyri næsta ár.

Herfyri boðaði formaðurin í fíggjarnevndini, Óli Breckman, frá, at fíggjarnevndin fer ikki at góðtaka, at uppskot um eykajáttanarlógir koma fyri løgtingið í heilum, og tí skuldi fíggjarlógin metast sum útgangsstøðið fyri øllum útreiðslum. Og Karsten Hansen er samdur við fíggjarnevndarformanninum.

- Eg meti avgjørt, at tað er ein óvani, at eykajáttanaruppskot í stórum tali verða løgd fyri løgtingið mitt í einum fíggjarári. Sjálvandi kunnu óvæntaða útreiðslur stinga seg upp, men útgangsstøðið eigur altíð at vera, at eykajáttanir eru ein óvani, sigur Karsten Hansen. Hann leggur afturat, at hann fer at leggja dent á, at tølini á fíggjarlógini fara at halda, tá árið er av. Tí skulu allar eyka útreiðslur vera útreiðsluneutralar, tvs. at peningurin til tær skal takast av játtanini onkra aðra staðni.






# 200 til Íslands

**Komandi vikuskiftið skal bólkurin 200 leika í Íslandi. Farið verður til Íslands fríggjadagin og fleiri framførslur eru á skránni. Manningin í 200 hevur góð sambond til aðrar punk-bólkar har og eru ikki heilt ókendir í Íslandi. Møguliga skal 200 eisini til ein festival seinni**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Fríggjadagin heldur manningin í punk/rock bólkinum 200 avstað til Íslands. Fleiri framførslur eru á skránni um vikuskiftið. Fríggjakvøldið leikar 200 á barrini Sirkus. Leygarkvøldið er stóra kvøldið. Tá skal 200 á pall á Grand Rokk. Har leikar eisini ein bólkur, ið nevnist The Dudley Corporation.

Niels Arge Galán úr 200 sigur, at Grand Rokk er kanska ikki eitt so stórt stað, men tað er eitt in-stað í Reykjavík.

200 skal eisini hava sonevndar promotion konsertir. Hesar verða í handlinum Hljómalind, ið Kiddi eigur. Kiddi hevur í longri tíð staðið fyri at fáa føroyskar bólkar til Ísland og so er eisini hesaferð, har samstarv er við Tutl. Fløgan við 200 er sjálvsagt at fáa í Hljómalind, eins og fleiri aðrar fløgur við føroyskum bólkum, ið ríða á føroysku bylgjuni í Íslandi. Um viðrar, so verður spælt uttanfyri Hljómalind, men annars verða framførslur inni í handlinum.

### Góðar vinir í Íslandi

Niels Arge Galán sigur, at teir í 200 hava góð sambond til Íslands, har teir hava vitjað áður. 200 hevur samband við fleiri punkbólkar í Íslandi, Forgarður Helvitis og aðrar, og teir hava góðar vinmenn har yviri. Teir hava sent teldubrøv sínamillum og eins og fløgur. Og onkur hevur boðað frá, at teir koma at lurta á Grand Rokk leygarkvøldið.

Eins og føroyskir bólkar vitja Ísland, so hevur talan eisini verið um at fáa íslendskar bólkar hendaveg, men enn er einki fastlagt.

Ætlanir eru um, at 200 skal luttaka á einum festivali í Íslandi í næstum, men enn vita teir í 200 einki nærri hesum viðvíkjandi, men vænta sær boð fyrsta dagin.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikanskur kavbátur sigldi á "Kursk"

**Leiðslan í russiska Norðurflotanum sigur nú, at kavbáturin "Kursk" sakk, eftir at amerikanski kavbáturin "Toledo" hevði siglt á hann**

"KURSK"-VANLUKKAN
*Árni Joensen*

Russar hava fyrr hildið uppá, at tað var ein amerikanskur kavbátur, sum sigldi á "Kursk", men hetta er fyrstu ferð, at russiska flotaleiðslan almannakunnger navnið á amerikanska kavbátinum.

Alment hava myndugleikarnir í Moskva fyrr staðfest, at "Kursk" sakk, tí ein torpedo sprongdist umborð á bátinum, men talsmaðurin hjá Norðurflotanum, Vladimir Navrotskij, sigur, at flotaleiðslan er sannførd um, at "Kursk" sakk eftir samanstoyt við tann kjarnorkuvápnaða amerikanska kavbátin "Toledo".

Norðurflotin setti í síni tíð eina nevnd at kanna, hvat var varið fram, og hendan nevndin kom til eina heilt aðra niðurstøðu enn tann kanningarnevndin, sum stjórnin í Moskva setti. Russiskir flotaleiðarar hava onkuntíð róð uppundir, at ein amerikanskur kavbátur var tann veruliga orsøkin til vanlukkuna, men hetta er fyrstu ferð, at flotaleiðslan er so avgjørd um hetta mál.

Sambært russisku flotaleiðsluni var "Toledo" staddur millum fýra russiskar kjarnorkukavbátar ín Barentshavinum, tá amerikanskir skiparin varnaðist, at "Kursk" gjørdi seg til reiðar at skjóta eina torpedo sum lið í venjingini hjá russiska flotanum. Russar siga, at fjáltur kom á amerikansku kavbátamanningina, og at "Toledo" rendi á "Kursk", sum sakk.

Russar siga, at teir vistu av "Toledo" longu tríggjar dagar fyri vanlukkuna, og at teir høvdu fylgt kavbátinum hesar dagarnar. Amerikanarar hava váttað, at "Toledo" og ein annar amerikanskur kavátur, "Memphis", vóru á leiðini, tá "Kursk" sakk.

Russiska flotaleiðslan sigur, at "Memphis" fór upp í vatnsskorpuna stutt eftir vanlukkuna, meðan "Toledo" var verandi niðri í sjónum. Har lá hann í eitt samdøgur, áðrenn hann setti kós ímóti einari herflotastøð í Skotlandi.

Russar bóðu tá um at sleppa at kanna "Memphis" og "Toledo", men amerikanarar søgdu nei.

# Danir vilja hava evruna

Nógvir danir, sum hava hildið summarfrí í teimum ES-londunum, sum nýta evruna, halda, at felags gjaldoyrað eigur eisini at verða sett í gildi í Danmark.

Ein kanning hjá Jyllandspostinum vísir, at 27 prosent av teimum, sum hava goldið við evruni í summarfrítíðini, hava fingið betri eygað á felags gjaldoyranum, enn tey høvdu undan summarfrítíðini. Sjey prosent eru farin hinvegin.

Samanumtikið vísir kanningin, at stórur meiriluti er fyri, at Danmark skal fáa sær evruna ístaðin fyri krónuna. 58 prosent eru fyri felags gjaldoyranum og bert 35 prosent ímóti.

# Ávarar ímóti kríggi

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore, ávarar nú Bush ímóti at leypa á Irak.

Í einari røðu í San Fransisco segði Gore, at stjórnin hjá Bush hevur valt eina vandamikla kós, sum kann enda við kríggi við Irak, og sum hóttir við at sáða split millum USA og tess sameindu. Hann helt eisini, at krígsætlanin kann fáa óhepnar avleiðingar fyri bardagan ímóti yvirgangi. Al Gore heldur, at USA eigur ístaðin at leggja størri dent á at gera enda á al-Qaeda.

Fyrrverandi varaforsetin segði seg taka undir við, at Saddam Hussein er ein hóttan ímóti økinum við Persaflógvan og ímóti USA, men hann helt kortini, at amerikanska stjórnin eigur at taka lut í ST-tiltøkum heldur enn at ganga sína egnu leið.

# Krevja ísraelska afturtøku

**Trygdarráðið hjá ST krevur, at Ísrael skal taka stríðsvognarnar burtur frá høvuðsstøðini hjá Yasser Arafat í Ramallah. USA atkvøddi ikki fyri kravinum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*



*Síðani seinasta hósdag hava ísraelskir stríðsvognar kringsett høvuðsstøðina hjá Yasser Arafat í Ramallah. Flestu bygningarnir eru lagdir í oyði.*
*Mynd: Reuters*

Aftan á eitt ellivu tímar langt orðaskifti samtykti trygdarráðið hjá ST gjáranáttina at krevja, at Ísrael skal taka seg burtur frá høvuðsstøðini hjá palestinska leiðaranum, Yasser Arafat, í býnum Ramallah. Síðani seinasta hósdag hava ísraelskir stríðsvognar kringsett støðina, og gravkýr hava oyðilagt fleiri av bygningunum.

14 av teimum 15 londunum í trygdarráðnum atkvøddu fyri kravinum. USA atkvøddi ikki. Amerikanski umboðsmaðurin, James Cunningham, segði, at amerikanska stjórnin kundi ikki taka undir við samtyktini, tí hon fordømdi ikki teir víðgongdu palestinsku bólkarnar Hamaz og Islamiskt Jihad, sum hava átikið sær ábyrgdina av teimum seinastu sjálvmorðsbumbuatsóknunum í Ísrael. Amerikansaki ST-sendiharrin, John Negroponte, segði tó, at USA tekur undir við, at Ísrael skal gevast við atsóknini at høvuðsstøðini hjá Arafat.

Í samtyktini krevur trygdarráðið eisini, at Ísrael skal taka herin úr teimum býum og bygdum á Vestara Áarbakka, sum hann hevur hersett.

# Norðmenn órógvaðu

Russiska herflotaleiðslan vil nú vera við, at norska fregnartænastan órógvaði russar, tá teir bjargaðu vrakinum av kavbátinum "Kursk" í summar.

Sambært leiðsluni hjá russiska norðurflotanum løgdu norðmenn út boyur, sum sendu óljóð av ymiskum slagi, og tað órógvaði bjargingararbeiðið, sigur flotaleiðslan. Russiska stjórnin metir málið so mikið álvarssamt, at Sergej Ivanov, verjumálaráðharri hevur borið tað upp á mál fyri norska starvsbróðuri sínum, Kristin Krohn Devold.

Í Noregi vísa myndugleikarnir russisku skuldsetingunum aftur, og norska verjuleiðslan sigur, at hon hevur als ikki ta útgerðina, sum russar sipa til. Russar siga, at óljóðið frá teimum norsku boyunum órógvaði samskiftið millum kavararnar og bjargingarskipini, og at hetta gjørdi arbeiðið hjá kavarunum sera trupult og harafturat vandamikið.

# Saddam grevur skotgravir

**Í Irak hevur Saddam Hussein, forseti givið herinum boð um at grava skotgravir kring høvuðsstaðin Bagdad. Samstundis hevur hann sjálvur tikið við leiðsluni í tjóðarhirðini**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Útlagni irakski andstøðubólkurin, sum heldur til í London, sigur seg hava fingið at vita, at 30.000 menn hjá iraksku tjóðarhirðini hava tikið sær støð 30 kilometrar uttan fyri Bagdad. Uppgávan er at verja býin, skuldu amerikanarar lopið á.

Eisini skal forsetin hava sett nakrar aðrar deildir hjá tjóðarhirðini at verja sjálvan miðbýin í Bagdad. Hesir hermenninir skulu verja ymsar týðandi almennar stovnar og forsetan sjálvan.

Samstundis sum irakar sostatt fyrireika seg til eitt amerikanskt álop, eru amerikanarar farnir at rokna út, hvat eitt álop á Irak kemur at kosta amerikanska ríkiskassanum. Og tað er ikki eiti á tøl, tí sambært einari frágreiðing hjá Kongressini fer álopið at kosta USA einar 1500 milliardir krónur. Kongressin sigur kortini, at eydnast álopið væl, kunnu útreiðslurnar haldast niðri á umleið 450 milliardum krónum.

Júst útreiðslurnar av einum kríggi við Irak hava stóran politiskan áhuga í USA orsakað av teirri vánaligu gongdini í landsins búskapi, og fleiri hava ávarað um, at dregur kríggið út, fer tað at gera búskaparviðurskiftini uppaftur verri, enn tey longu eru.

# Einki dunkarok

Mánadagin kundu danir fara í handilin at keypa sær øl og sodavatn í dunkum, men hóast nógv hevur verið skrivað og tosað um dunkamálið í fleiri ár, var áhugin ikki tann stóri, nú dunkarnir loksins komu í handlarnar.

Teir flestu handlarnir siga, at fólk hava størri áhuga fyri fløskunum enn dunkunum, og bryggjaríini siga tað sama.

Frágreiðingin sigst vera prísurin, tí orsakað av serligum avgjøldum á dunkunum eru teir dýrari enn fløskurnar. Tí vænta bryggjaríini ikki, at verulig gongd kemur á søluna, fyrr enn stjórnin ger av at seta avgjøldini niður, men tað hevur stjórnin ongar ætlanir um - ikki enn í hvussu er.